# Oyruni í slovakisku maskinuna

**U–17 landsliðið tapti 7–0 ímóti Slovakia, og í dag verður avbjóðingin roknað at fara at verða uppaftur torførari**

U–17 EM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*



*Bill Jacobsen er venjari hjá føroyska U-17 landsliðnum*

Føroysku U–17 dreingirnir hava orduliga fingið sína søk fyri, nú teir í hesi vikuni luttaka í EM undankapping í Slovakia. Teir eru í bólki saman við Slovakia, Grikkalandi og Letlandi. Fyrrapartin týsdagin spældu teir ímóti vertstjóðini, og Slovakia vann ikki minni enn 7–0, eftir at støðan eftir teir fyrstu fjøruti minuttirnar hevði verið 4–0.

Í hinum dystinum spældu Grikkaland og Letland 1–1. Føroyingarnir hava alla tíðina roknað við, at torførasta avbjóðingin fór at verða ímóti Grikkalandi, sum fyrrapartin í dag er mótstøðuliðið hjá Føroyum. At Letland í fyrradagin megnaði javnleik ímóti Grikkalandi bendir á, at mótstøðan í øllum trimum dystunum fer at verða ivaleysa stór.

### Gongdin ikki ókend

Í stuttu altjóða føroysku fótbóltssøguni er EM undankappingardysturin í Beograd í 1991 tiltikin. Eftir 1–0 sigur á Eysturríki í Landskrona og 4–1 tap í Ítróttarparkini í Keypmannahavn á heysti í 1990 og 1–1 í Belfast 1. mai í 1991 var mótið gott, tá ið føroyska liðið fjúrtan dagar seinni spældi ímóti jugoslavisku snillingunum. Føroyingarnir fingu loyvi at hava bóltin, liðið royndi at spæla og flutti seg fram eftir vøllinum, og so vóru jugoslavarnir eirindarleysir, tá ið teir fingu fatur á bóltinum. Ofta var tað eftir persónlig mistøk hjá føroyingunum.

Nakað soleiðis ljóðar tað frá føroysku leguni í Bardil, ið er ein minni býur ikki so langt frá Kosice, sum er næststørsti býurin í Slovakia og liggur suður ímóti ungversku markinum og kanska einar 75 kilometrar vestur úr ukreinska markinum.

Úrslitið var tað sama, sum tað var hjá a–lands-liðnum í Jugoslavia á sinni, men spælið hjá slovakunum var ikki so leikandi lætt.

– Tað ljóðar kanska eitt ótrúligt, men veruleikin var tann, at í bóltførleika vóru teir ikki so nógv betri enn okkara. Men teir vóru skjótir. Ikki minst tá ið teir sektaðu okkara mistøk, og teir vóru ógvuliga tryggir frammanfyri málinum, sigur Heðin Askham, sum er føroyskur hjálparvenjari í Slovakia. Venjari er Bill Jacobsen.

Hevði føroyska liðið ongan møguleika?

– Vit taptu 7–0, og tað boðar sjálvandi frá, at teir vóru betri enn vit. Eftir persónligt mistak fingu teir hol á í 10. minutti. Tað var stórur skelkur, og okkara vóru ikki komnir fyri seg, tá ið teir tveir minuttir seinni øktu til 2–0. So skoraðu teir í 28., 34., 55. 61. og 79. minutti. Málið til 6–0 var brotsspark. Okkara vóru fleiri ferðir í góðum støðum fyri málinum hjá teimum, uttan at tað eydnaðist at fáa mál. Andreas Lava Olsen var miðvallari í høgru. Hann var størsta álopshóttanin hjá okkum, og hann megnaði fleiri ferðir at koma innum verjuna hjá teimum, men tíverri var neyvleikin ikki nóg stórur, tá ið hann hevði strítt seg í góðar støður, og fleiri royndir fóru omanfyri og við síðuna av málinum, sigur Heðin Askham.

Í fyrrakvøldið og í gjár, tá ið eisini løtt venjing var á skránni, royndu venjararnir og hini ábyrgdarfólkini í føroysku leguni at fáa spælararnar sinniliga at koma fyri seg aftur eftir avhølvingina. Í dag skulu teir aftur í eldin, og tað verður ikki ivast í, at tað verður torført:

– Vit hava alla tíðina roknað Grikkaland sum torførasta mótstøðuliðið. Teir hava framúr bóltførleika, og teir eru skjótir og hugflogsríkir. Men kanska er tað ikki verri fyri okkum, at mótstøðumenninir pressa okkum í botn. Ofta hevur tað víst seg, at føroysk landslið, sum hava verið nógv kroyst, hava megnað væl at verið kompakt og tøtt í verjuni, heldur Heðin Askham, sum letur heilsa, at øll í føroysku leguni í Slovakia hava tað gott.

Umframt spælararnar og teir báðar venjararnar eru føroyingarnir í Slovakia Durita Rouch, sum er fysioterapeutur, Heri Olsen, sum er liðleiðari og Niklas á Líðarenda, næstformaður í FSF, sum er ferðaleiðari.

Føroyska liðið ímóti Slovakia sá soleiðis út: Tróndur Kragesten, HB – Bárður Mittelstein, HB, Jóhan Davidsen, NSÍ, Borgar Kristiansen, Skála, Einar Hansen, NSÍ – Andreas Lava Olsen, LÍF, Bogi Løkin, NSÍ (Jóhan V. Gunnarsson, B36, 36.), Ólavur í Ólavsstovu, HB, Poul Tummas Dam, HB (Jón Krosslá, VB, 36.), Christian R. Mouritsen, HB – Per Jacobsen, HB (Kristoffur Jacobsen, KÍ, 66.)

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn vóru Sam Jacobsen, GÍ, Asbjørn V. Gunnarsson, B36, Gunnar Haraldsen, HB og Røgvi Ryggshamar, LÍF. Einasta gula kortið fekk Jóhan Davidsen í 66. minutti.

# Gullvinnarar hjá gentum

Hjá B36 royndist kappingarárið einki serligt, tá tosast skal um gullmerki. Í flestum førum mátti árstalsfelagið eisini hyggja skeivt at grannunum, sum struku avstað við gullinum í fleiri deildum, men tó ikki alla staðni.

Hjá gentum 12-14 ár eydnaðist nevnliga B36 at tryggja sær gullmerkini. Og fyri kvinnufótbóltin í felagnum man hetta í øllum førum vera ein hugalig staðfesting. Her hevði B36 annars leingi eina oddastøðu, men seinnu árini er hendan í øllum førum heilt yvirtikin av KÍ, tá tosast skal um bestu deildina. Og heldur ikki hjá teimum 14-17 ára gomlu stóð nakað serligt til hjá B36, sum als ikki hevði lið í deildini í ár. Men tann veruleikan rokna tey tó við at broyta til komandi ár, og sum gullmerkini í ár vísa, so skuldi fortreytirnar fyri hesum verið góðar.



*B36 liðið, sum vann gull í kappingina hjá gentum 12-14. Standandi frá vinstru eru tað: Laura Dahl, Unnur Danielsen, Lena Guttesen, Anna Maria Sloan, Sonja Kristoffersen og Sissal Kristiansen, venjari. Húkandi frá vfinstru eru tað Barbara Tausen, Kristina Thomassen, Ann Thomsen, Rósa Christiansen, Rúna Højgaard og Barbara Langgaard. Heidi Olsen væntar á myndini*



Petur Højgaard, kommunulækni:

# Ein journal fyri hvønn sjúkling

**Ein skipan fyri alt heilsuverkið, har bara ein journalur er fyri hvønn sjúkling. Tað er ein fyrimunur við SAGA-skipanini, sum Petur Højgaard, kommunulækni, er heitur talsmaður fyri. Sjey aðrir kommunulæknar eru ímóti skipanini og vilja heldur hava eina danska**

LÆKNASTRÍÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Teir eru treiskir. Vit hava argumentini, sigur Petur Højgaard, kommunulækni, nú kommunulæknar í Havn stríðast um edv-skipanina*

*Tilvildarlig mynd*

Ein íslendsk SAGA. Ella ein donsk MedWin.

Tað er ein spurningur, sum skilur kommunulæknar í Havn í hesum døgum. Bylgjurnar ganga so høgt, at ein lækni hevur sagt upp av hesari orsøk, og aðrir hótta við at fara sama veg. Bara tveir læknar hava í roynd og veru roynt íslendsku skipanina, SAGA, sum Býráðið vil hava læknarnar at nýta. Teir eru Dánjal Petur Højgaard og Annika Olsen, sum halda til í Berjabrekku. Tey bæði eru heit talsfólk fyri íslendsku skipanini. Allir hinir sjey kommunulæknarnir vilja hava eina danska skipan í staðin.

– Teir eru treiskir. Vit hava argumentini. SAGA-skipanin er ment í einum føroyskum-íslendskum samstarvi. Hon hevur avgerandi fyrimunir í mun til donsku skipanina. Hon er lættari at handfara, meiri fullfiggjað, betri útgjørd, tryggari, meiri fleksibul og tosar saman við øðrum skipanum, sigur Petur Højgaard, sum annars er fluttur til Sandoyar at vera lækni.

Í Sandoy hevur Petur Højgaard fingið høvi at roynt eina av nýggjaru donsku skipanunum. Sostatt er hann tann einasti, sum kann samanbera skipanirnar á haldgóðum grundarlagi. Og hann er sannførður um, at tann íslendska, sum er føroyskað hjá Formula.fo, er nógv meiri tíðarhóskandi enn donsku skipanirnar.

Vit fara saman við Peturi Højgaard ígjøgnum nøkur av sjónarmiðunum hjá teimum báðum læknunum, sum hava sjey kommunulæknar í Havn ímóti sær.

### SAGA fleksiblari

Tað er ikki so stórur munur á skipanunum, tá tað kemur til vanligt arbeiði í viðtaluni. Allir skipanir megna at skriva rokningar, skriva resept, notatir og geva tíðir. Kortini er SAGA væl betri í gerandisdegnum, sigur Petur Højgaard.

– Danska skipanin, sum eg havi roynt á Sandi, er væl tyngri enn SAGA-skipanin, sum eg havi roynt í Berjabrekku, sigur Petur Højgaard, og vísir á fleiri viðurskifti.

Danska skipanin er ikki so gjøgnumførd, eitt nú mást tú fara úr einum máli fyri at koma inn í eitt annað, og í SAGA er lættari at skifta ímillum. SAGA-skipanin hevur eitt føroyskt markamót, donsku skipanirnar eru danskar. Harafturat kemur, at allar hugsandi blankettir er á føroyskum í SAGA – eitt nú innleggingarseðlar, læknaváttanir, reseptir, rokningar og annað, greiður Petur Højgaard frá. Blankettirnar mugu skrivast í hond í donsku skipanini, tí ongar eru.

Petur Højgaard vísir eisini á eyka veitingar í SAGA-skipanini. Forsíðan gevur møguleika fyri skjótum yvirliti yvir sjúklingar. Arbeiðslistin vísir øll óavgreidd mál. Landsfólkayvirlitið er lagt inn í skipanina, so skjótt er at finna sjúklingar. Og so er tað medisinlistin, sum verður dagførdur 14. hvønn dag í SAGA. Hin er ikki dagførdur í áravís.

### Skipan má samskifta

Serliga umráðandi fyri Petur Højgaard og Anniku Olsen, sum hava roynt SAGA-skipanina, hevur verið, at hon er góð at samskifta við. Til ber at senda og móttaka upplýsingar elektroniskt frá øðrum læknum, frá sjúkrahúsum, laboratorium, røntgendeild, apoteki, Almannastovu, sjúkrakassa, heilsu- og heimasjúkrasystrum.

– Hetta er ein sjálvsøgd fortreyt fyri eini vælvirkandi edv-læknaskipan. Tað er mín påstandur, at tær skipanir, sum eru í Føroyum í dag, koma ongantíð at samskifta, tí danska skipanin fyri samskifti kemur ikki til Føroya. SAGA-skipanin samskiftir, við tað at hon er knýtt at netinum hjá heilsuverkinum. Tað merkir, sum vit hava sæð í Berjabrekku, at vit hava samband millum viðtalurnar, og til ber at senda resepteir, ávísa og móttaka svar frá røntgendeildini og annað, sigur Petur Højgaard.

### Heildarloysn neyðug

Neyðugt er at byggja eina telduskipan upp frá nýggjum í heilsuverkinum, heldur Petur Højgaard, og tí eftirlýsir hann einari heildarloysn.

– Okkara hugsan er, at eingin edv-útgerð av týdningi finst innan føroyska heilsuverkið í dag, og tí mugu vit byrja á berum. Hetta gevur hinvegin møguleikan fyri at skapa eina heildarskipan, sum umfatar sjúkrahúsini, kommunulæknarnar, heimarøktina, heilsurøktina, apoteksverkið, Almannastovuna og sjúkrakassarnar. Arbeitt eigur at vera við heildini. Ikki petta málið sundur, so sum aðrir hava gjørt, og uppskriftin er ein servari fyri alt Heilsuverkið. Ein journal fyri hvønn sjúkling, sigur Petur Højgaard.

Petur Højgaard sær fleiri fyrimunir við slíkari skipan. Journalin er altíð dagførd við tað, at øll skrásetingar gongur ígjøgnum hana. Læknin kann leggja boð í journalini um diagnosur, viðgerð, ovurviðkvæmi og slíkt, sum kann hava týdning hjá øðrum læknum at vita. Og tí kemur skipanin sjúklinginum til góðar, tá alt kemur til alt.